Knút Lützen, nevndarformaður:

# - Bjarni Djurholm kvaldi FaroeJet

**Knút Lützen tekur undir við kritikkinum av leiðsluni í FaroeJet, sum hevur verið frammi síðstu tíðina. Hann metir tó, at støðan hevði verið ein onnur, um Bjarni Djurholm ikki var landsstýrismaður í loftferðslumálum**

LOFTFERÐSLA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

– Eg kann einans siga, at eg taki undir við kritikkinum. Tað er nógv, sum kundi verið gjørt øðrvísi, sigur Knút Lützen, sum var nevndarformaður í FaroeJet.

– Tað er tó ikki allur sannleikin. Vit í nevndini hava eisini ein stóran part av skuldini fyri, at tað gekk, sum tað gjørdi. Tó er alt gjørt í bestu sannføring - eisini valið av leiðsluni, sigur hann.



*Bjarni Djurholm dugir kanska at undirvísa børnum í skúlanum, men hann kann so ikki brúkast í núverandi sessi, sigur Knút Lützen*

### Ítøkilig mistøk

Tá ið Knút verður biðin um at greiða meira ítøkiliga frá, hvat varð gjørt skeivt, sigur hann:

– Vit komu ov seint í gongd við søluni. Hetta var tó ikki nakað, sum vit høvdu so stóra ávirkan á. Vit fingu knappliga eitt flogfar, og tað er ikki lætt at gera fyrireikandi arbeiða, tá ið vit høvdu so stutta freist.

– Vit valdu eisini skeiva bookingskipan. Umframt tað hava vit verið ov lítið ágangandi við sølu og marknaðarføring.

Knút heldur tó eisini, at politiski myndugleikin eigur ein stóran part av skyldini fyri, at FaroeJet ikki bar seg.

– Kappingarneytin hjá okkum hevði veldigar fyrimunir. Hetta er nakað, sum politiski myndugleikin kundi gjørt okkurt við, men einki varð gjørt, sigur hann.

### Bjarni Djurholm er orsøkin

Tað er serliga ein persónur, sum, sambært Knút, hevur verið orsøkin til, at FaroeJet ikki bara seg.

– Hevði Bjarni Djurholm ikki verið landsstýrismaður í loftferðslumálum, hevði støðan verið ein onnur í dag, sigur Knút.

Spurningurin er so, um nevndin í FaroeJet ikki tók eitt í so vágið stig at stovna hetta felagið, tá ið fortreytirnar eru so vánaligar, sum Knút sigur tær vera.

– Vit kendu ikki treytirnar áðrenn. Vit fingu at vita, at tveir triðingar av Atlantsflog skuldi privatiserast. Tað hendi so ikki. Atlanstflog átti heldur ikki at fingið loyvi til at sett eina súluskipan í verk beint áðrenn, vit byrjaðu. Teir skuldu ikki hava nakrar fyrimunir fram um okkum, men tað høvdu teir.

– Bjarni Djurholm umskyldaði seg við, at hann kundi ikki broyta eitt danskt málsøki. Tað er jú púra ósatt. Tað er óhoyrt, um ein eigari ikki kann taka avgerðir um sítt egna felag.

– Bjarni Djurholm hevur als ikki skil fyri vinnulívi. Hann dugir kanska at undirvísa børnum í skúlanum, men hann kann so ikki brúkast í núverandi sessi, sigur Knút Lützen bersøgin.

### Føroyingar satsa uttanlands

Knút heldur annars, at arbeiðið við at stovna eitt nýtt føroyskt flogfelag er áhugavert.

– Hetta er sera áhugavert fyri føroyingar. Oddmar segði við Sosialin, at teir helst fara at flúgva uttanlands, og tað ljóðar skilagott. So leingi, sum politikkararnir ikki vilja skapa karmar fyri kapping í Føroyum, kunnu vit ikki hava tvey flogfeløg, sum flúgva til Føroyar. Uttanlands er »fair« kapping, og har vænti eg, at føroyingar kunnu klára seg væl, tí at vit duga væl at flúgva.

Knút Lützen:

# Skuffaður av starvsfólkunum í FaroeJet

**Atlansflog hevur sagt frá, at starsvfólkini hjá FaroeJet ikki vildu hjálpa til at flyta tey ferðafólkini, sum høvdu keypt ferðaseðil við FaroeJet. - Hetta er sera óproffesionelt, ásannar Knút Lützen**

FLOGFERÐSLA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Starvsfólkini hjá FaroeJet vilja ikki hjálpa til at flyta ferðafólkini, sum hava keypt ferðaseðil við FareoJet. Atlantsflog hevur átikið sær at flyta ferðafólkini, men kortini vilja starvsfólkini hjá FaroeJet ikki rætta eina hjálpandi hond.

– Hetta er ein avgerð, sum manningin hevur tikið av sínum eintingum. Hvørki nevnd ella leiðsla hevur nakað við hetta at gera.

– Eg harmist ómetaliga nógv um hesa avgerð. Hetta er sera óproffesionelt av okkara starvsfólkum. Almenna grundgevingin er, at tey eru ikki nóg væl fyri sálarliga til at kunna flúgva. Tað ber tó ikki til at vera beiskur alt lívið, sigur Knút.

Spurdur um hetta merkir, at veruliga orsøkin til, at starvsfólkini nokta at hjálpa til, er ein onnur enn tann, sum tey hava meldað út, sigur Knút.

– Tann kunnu vit so bara gita um. Tað fara eg tó at lata onnur døma um. Eg kann einans siga, at eg eri sera, sera skuffaður av starvsfólkunum. Vit hava eina ábyrgd fyri teimum fólkunum, sum hava keypt ferðaseðil frá okkum, og hesi fólk hava tey svikið, sigur Knút at enda.

*Lesið viðmerkingar um FaroeJet frá Bjarna Djurholm, Johan E. Simonsen og Óla Marner Christiansen*

*á síðu 42*

